# Strandferðslan hótt av verkfalli á páskum

**STÓR ÓSEMJA** Yvirmenninir hjá Strandferðsluni og Fíggjarmálaráðið er langt frá eini semju um ein nýggjan sáttmála og tí er stórur vandi fyri, at skipini verða løgd

Áki Bertholdsen

Nú er stórur vandi fyri, at øll skipini hjá Strandferðsluni verða løgd um nakrar fáar vikur.

Og hendir tað, er tað eisini stórur vandi fyri, at Strandferðslan heldur ikki fer at sigla á páskum.

Orsøkin er, at ósemja er ímillum Fíggjarmálaráðið øðrumegin og Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið hinumegin, um nýggjan sáttmála fyri yvirmenninar hjá Strandferðsluni.

Sáttmálin fór úr gildi tann 1. oktober og síðani hava fleiri samráðingar verið ímillum partarnar.

Men allar samráðingar eru endaðar úrslitaleysar og tí vórðu semingsmenninir boðsendir herfyri.

Men stórt arbeiðstrýst hevur ført við sær, at partarnir hava verið samdir um at bíða við semingsroyndunum.

### Lodda dýpið

Sostatt eru semingsroyndirnar ikki byrjaðar enn, men Alfred Petersen, sum er semingsmaður saman við Jógvan Amonsson, sigur, at teir eru farnir at lodda dýpið.

– Vit hava havt fyrireikandi prát við partarnar fyri at vita, hvat ósemjan ítøkiliga snýr seg um.

Fyrireikingarnar eru ikki lidnar enn og semingsmaðurin sigur, at verður niðurstøðan, at nakað er at byggja á, verður tað eitt sindur út í apríl, at sjálv semingsroyndin byrjar.

Skírishósdagur er 21. apríl, so gongur illa, er vandi fyri, at Strandferðslan verður rakt av arbeiðssteðgi á páskum, skuldi tað hent, at semingsroyndin endar úrslitaleys.

Og tað er slett ikki ósannlíkt at samráðingarnar enda úrslitaleysar, tí bæði Eyðstein Djurhuus, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, og Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, søgdu við Sosialin herfyri, at partarnir standa rættiliga langt frá hvørjum øðrum og at vandi er fyri, at tað endar við arbeiðssteðgi.



# SAMRÁÐAST NÚ UM AT FRIÐA STRAND-FERÐSLUNA

**VERKFALL OG SIGLING** Hol er nú sett á samráðingar ímillum Fíggjarmálaráðið og fakfeløg um at lata skipini hjá Strandferðsluni sigla, hóast arbeiðssteðgur er

Áki Bertholdsen

Tað hevur verið tosað um tað í nógv ár!

Men nú skal tað vera, at skipini hjá Strandferðsluni skulu sleppa at sigla, hóast tað verður lýst verkfall ella verkbann.

Fíggjarmálaráðið hevur nú tikið stig til samráðingar við fakfeløgini fyri at finna semju um eina skipan, so at skipini hjá Strandferðsluni ikki verða løgd, hvørja ferð arbeiðssteðgur er.

Hetta hevur verið eitt afturvendandi spurningur, at kalla hvørja ferð arbeiðssteðgur hevur verið minst hesi seinastu 20 árini.

Men hóast politikarar javnan og savnan hava lovað at viðgera málið, er lítið og onki hent á økinum.

Men fyrr í ár kallaði Fíggjarmálaráðið fakfeløgini, sum hava manning umborð á Strandferðsluskipinum, til fundar at viðgera málið.

Sostatt er hol sett á, men enn er ikki meiri hent.

Men á hesum fyrsta fundinum varð avtalað, at næsta stigið skal verða, at fakfeløgini, sum hava fólk, ið eru knýtt at skipunum hjá Strandferðsluni, hava ein innanhýsis fund at viðgerða støðuna.

Tað varð eisini avtalað, at tað skal vera Starvsmannafelagið, sum tekur stig til tann fundin.

**»** **Verður arbeiðstíðin sett niður, skal lønin eisini lækka**

### Ongar gitingar

Sostatt liggur bólturin hjá Starvsmannafelagnum, og forkvinnan í felagnum, Selma Ellingsgaard, sigur, at á hesum innanhýsis fundinum ímillum fakfeløgini, skulu tey allarfyrst umrøða spurningin, um tey yvirhøvur eru sinnað at gera eina semju um at friða Strandferðsluskipini fyri verkfall.

Verður niðurstøðan, at tey eru sinnað at finna eina loysn, skulu tey eisini semjast um, hvussu tað kann gerast og, hvør loysnin kann verða.

**»** **Semingsroyndin byrjar í næstum**

Av tí, at ongin fundur hevur verið enn, vil Selma Ellingsgaard ikki í holt við nakrar sum helst gitingar um, hvat úrslitið av einum slíkum fundi ímillum fakfeløgini verður.

Men tá ið tann fundurin hevur verið, skulu fakfeløgini venda sær aftur til Fíggjarmálaráðið og so verður farið víðari haðani frá.

aki@sosialurin.fo

*Veitst tú eina søgu, so send SMS á 28 50 04*